UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Kappingareftirlitið
Skálatrøð
100 Tórshavn
Føroyar

Tórshavn, tann 28. september 2018
J.nr.: 18/00407-5
At tilskila í svari
Viðgjørt: ABD
Tygara skriv:

**Viðvíkjandi fyrispurningi frá Kappingareftirlitinum um løgtingslóg um havnaloðsing**

Kappingareftirlitið spyr Uttanríkis- og vinnumálaráðið í teldubrævi tann 30. august 2018, vísandi til § 2, stk. 4 í kappingarlógini, um tann kappingaravmarking, sum Fuglafjarðar kommuna fremur, er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av tí skyldu, sum er áløgd kommununi sambært § 4, stk. 1 í løgtingslóg um havnaloðsing.

Um ein almenn regulering skal seta reglurnar í 2. og 3. kapittli í kappingarlógini til viks skal talan vera um

- eina **beinleiðis fylgju** av almennari regulering, tvs. at hetta skal framganga greitt og eyðsýnligt av lóggávuni ella, sum tað minsta, vera greitt, at løggevari hevur fyrihildið seg til spurningin, at talan er um eina kappingaravmarking ella
- eina **neyðuga fylgju** av almennnari regulering, har fyritøkan ikki kann yvirhalda lóggávuna uttan at fremja kappingaravmarkingina. Um fyritøkan hevur fleiri valmøguleikar og velur tann, sum er kappingaravmarkandi, kann hon ikki brúka § 2, stk. 2 sum verju.

Sambært § 2f í løgtingslóg um havnaloðsing eru kommunurnar loðsstøðir, og hava tær sambært § 4, stk. 1 í lógini veitingarskyldu. Sambært § 4, stk. 2 í lógini kann kommunan gera avtalu við privatan um at útinna loðsingina sambært § 4, stk. 1.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið heldur, at ætlanin hevur verið, at veitingarskyldan og heimildin hjá kommununi sambært § 4, stk. 2 í lógini um at gera avtalu við privatan fevnir bæði um sjálvan loðsin og um loðsbátin.

Hetta uppáhald verður stuðlað av, at tað í kap. 2 í uppskotinum til løgtingslóg um havnaloðsing stendur um fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar:

*Sambært uppskotinum skulu kommunurnar/havnirnar tryggja, at tey skip, sum eru fevnd av loðsskylduni, verða loðsað.* ***Kommunurnar/havnirnar mugu tí skil hava avtalu við góðkendar loðsar um at útinna hesa uppgávu og harumframt tryggja, at bátur er tøkur til uppgávuna, sum lýkur krøvini frá Sjóvinnustýrinum til loðsbátar.*** *Tað fer t.d. at hava við sær útreiðslur, at persónar skulu hava viðkomandi skeið, áðrenn teir kunnu fáa góðkenning sum loðsar. Eftir uppskotinum verða í kunngerð ásettar reglur um gjald fyri loðsing, soleiðis at útreiðslurnar av skipanini skulu verða fíggjaðar við gjøldum.* ***Gjøldini fyri***

TINGANES • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 30 66 00 • TELEFAX 30 66 65 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO

***loðsing skulu rinda fyri útreiðslur til tey skeið, sum loðsar skulu hava, útgerð, samsýning/løn til loðsar, útreiðslur til loðsbát v.m.***

Útfrá tí, sum omanfyri er ført fram um innihaldið í løgtingslóg um havnaloðsing, ber til at staðfesta, at løgtingslóg um havnaloðsing regulerar veitingarskylduna hjá kommununum viðvíkjandi loðsing, herundir bæði loðs og loðsbát.

Hóast veitingarskyldan hjá kommununi fevnir bæði um loðs og um loðsbát, eru reglurnar um gjald fyri loðsing og fyri loðsbát ikki tær somu. Sambært kunngerð nr. 153 frá 21. desember 2012 um loðsing, gjøld o.a. skal gjaldið fyri loðsbátin gjaldast beinleiðis til loðsbátaeigaran tvs. uttan um havnina/kommununa.

Av tí, at lóggávan um havnaloðsing er skipað á henda hátt, ber ikki til at staðfesta, at ein kappingaravmarking gongur greitt og eyðsýnligt fram av lóggávuni, ella at tað er greitt, at lóggevari hevur fyrihildið seg til spurningin. Tó útilokar løgtingslóg um havnaloðsing ikki kappingaravmarking, um hetta er nærri ásett av kommununi, sum eina neyðug fylgju av teimum áløgdu skyldunum hjá kommununi.

Tað áliggur kommununi at meta um, hvussu veitingarskyldan viðvíkjandi loðsing skal skipast, og heimild er fyri, at kommunan letur privat um at útinna loðsingina.

Kommunum er álagt ávísar treytir í sambandi við útinnan av veitingarskylduni. M.a. skal loðsstøðin hava eitt innaneftirlit við hvílutíð, loðsprógvum, arbeiðsumhvørvi og royndum, og skal loðsstøðin, eftir áheitan frá Sjóvinnustýrinum, leggja fram allar skrásetingar í hesum sambandi. Loðsskyldug skip skulu sambært §§ 3 og 4 í kunngerð nr. 153 frá 21. desember 2012 um loðsing, gjøld o.a. boða loðsstøðini frá komu og fráferð og sambært § 5 í somu kunngerð lata loðsstøðini ávísar upplýsingar.

Loðsstøðin hevur ábyrgdina av, at krøvini sambært lóggávuni verða hildin og skal mótvegis eftirlitinum, Sjóvinnustýrinum, prógva, at tey settu krøvini verða yvirhildin. Hetta er galdandi uttan mun til, um kommunan sjálv røkir uppgávuna, ella hevur gjørt avtalu við ein annan um at røkja uppgávuna.

At kommunan letur privat røkja loðsing, herundir loðsbátatænastu, førir ikki við sær, at kommunan/loðsstøðin ikki longur hevur ábyrgd av, at skyldurnar viðvíkjandi loðsing verða yvirhildnar. Tað kann tí vera neyðugt, at ein avtala fyriliggur millum partarnar soleiðis, at loðsstøðin fær tryggjað sær, at loðsar og loðsbátar útinna uppgávuna á ein slíkan hátt, at veitingarskyldan hjá kommununi og treytir í hesum sambandi verða yvirhildnar. Talan má vera um eina skipan, sum loðsstøðin/kommunan hevur gjørt, og ikki ein privatur, men í tí sambandi skal vera ansað eftir, at minst møguligt inntriv verður gjørd í kappingina.

Útfrá upplýsingum frá Kappingareftirlitinum sæst, at loðsbátatænasta verður røkt á privatum grundarlagi í hinum stóru havnunum í Føroyum, og at hetta fer fram undir vanligum marknaðartreytum. Um vanligar marknaðartreytir eru galdandi í hesum havnunum, og tørvur ikki er á at gera kappingaravmarkandi avtalur, kann verða spurt, hví hetta so skuldi verið neyðugt í Fuglafirði?

Sambært upplýsingunum frá Kappingareftirlitinum, hevur Fuglafjarðar kommuna sett P/F Faroe Agency ymsar forðingar í at veita loðsbátatænastu í Fuglafirði.

Tað gongur ikki greitt fram av loðslógini, at tílikar forðingar eru ein beinleiðis fylgja av løgtingslóg um havnaloðsing.

Lógin útilokar tó ikki, at tað verða settar avmarkingar, um tað í ítøkiligum førum verður mett, at tað er ein neyðug fylgja av teimum skyldum, sum eru álagdar kommuni eftir løgtingslóg um havnaloðsing.

Tað kann sjálvsagt ikki útilokast, at serlig viðurskifti eru galdandi í Fuglafirði í mun til í øðrum havnum, sum hava við sær, at tað er neyðugt at gera ávís inntriv í fríu kappingina fyri, at skipanin kann virka. Tað treytar, at kommunan hevur tikið nærri avgerð um tað, og grundgivið fyri, at ein slík avmarking er neyðug. Kommunan hevur tá skyldu til at ansa eftir, at talan er um minst møgulig inntriv í kappingina.

Tað hevur kommunan ikki gjørt, og treytin fyri møguligum avmarkingum er tí ikki lokin.

Kappingareftirlitið viðgerð í sínum tilmæli frá 15. august 2018 virksemi viðvíkjandi sleiping. Hetta virksemið er ikki fevnt av løgtingslóg um havnaloðsing ella aðrari lóggávu, men er tað upp til marknaðin at finna útav, hvussu hetta virksemið skal skipast.

Vinarliga

Anna Borg Dahl

**Fra:** Sigurd Rasmussen
**Sendt:** 30. august 2018 15:07
**Til:** Pól Edvard Egholm; Anna Borg Dahl
**Emne:** Fyrispurning samæbrt §2, stk. 2 & 4 í kappingarlógini um loðsskylduna hjá kommununum

Kappingareftirlitið arbeiðir í løtuni við einum málið, har eftirlitið metir at Fuglafjarðar kommuna hevur framt brot á §11 í kappingarlógini um misnýtslu av ráðandi støðu.

Fuglafjarðar kommuna hevur latið staðbundnum felagið at útinna loðsflutning og sleipitænastur fyri feløg, sum P/f Faroe Agency longu hevur avtala at útinna somu tænastur fyri.

Hesin fyrispurningur snýr seg bara um flutning av loðsi.

Kommunur eru sambært §4, stk. 1 í loðslógini álagdar eina loðsskyldu. Tað er álagt einstøku kommununi at tryggja, at onki loðsskyldugt skip ella skip sum ynskir loðs fer til ella frá bryggju uttan loðs í viðkomandi kommunu.
Í §2, stk. 2 í kappingarlógini er áseting um, at kapittul 2 og 3 eru ikki galdandi, um ein kappingaravmarking er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av eini regulering. Avgerð hesum viðvíkjandi tekur viðkomandi landsstýrismanni, sbrt. §2, stk. 4 í kappingarlógini.

Viðmerkingarnar til føroysku kappingarlógina koma ikki nærri inn á nær ein kappingaravmarking er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av eini regulering. Men KRL-Bet 95, sum var grundarlag undir fyrstu donsku kappingarlógini frá 1998, hevur eina nærri lýsing.

**1. Beinleiðis fylgja**
Kravið til nær ein kappingaravmarking er ein beinleiðis fylgja av eini regulering er, at hon antin framgongur beinleiðis av lóggávuni ella at tað er greitt at lóggevari hevur fyrihildið seg til, at talan er um eina kappingaravmarking, men at umstøðurnar gera at hon er neyðug[1].
Tað framgongur av §2 í loðslógini at loðsing ikki fevnir um loðsflutning. Hetta verður eisini stuðla av at, gjaldið fyri loðsing er ásett í kunngerð nr. 153 frá 21. desember 2012, meðan gjaldið fyri loðsflutning er ikki ásett nakrastaðni í lóggávuni. Tað framgongur beinleiðis av §13, stk. 1-3 í áðurnevndu kunngerð, at kostnaðurin fyri loðsflutning er ikki roknaður við í gjaldið fyri loðsing, men er nakað sum umboðsfelag ella reiðarí má rinda viðkomandi, sum hevur útint hesa tænastu.

Kappingareftirlitið metir, at lóggávan hevur ikki fyrihildið seg til tað støðu, har ein kommuna velur at lata staðbundnum felagið loðsflutning at útinna, hóast at umboðsfelag og reiðarí hava gjørt aðra avtalu.

Kappingareftirlitið metir at tað grunda á lógartekstin er nærliggjandi at halda, at tað sum útgangspunkt er umboðsfelag ella reiðarí sum avgera hvør skal útinna loðsflutningin. Hetta tí gjaldið fyri loðsflutning er ikki lógarregulera, og er hetta ábending um at prísurin á loðsflutningi skal vera marknaðargrundaður. Treytin fyri at hava ein marknaðrgrundaðan prís er, at keypari og seljari kunnu frítt tingast um prís og innhald av tænastuni, herundir eisini ikki at innganga avtalu. Tað gevur lítla meining at loðsstøðin skal avgera hvør skal útinna loðsflutningin, tí tá er latið upp fyri monopolprísáseting av loðsflutninginum.

**2. Neyðug fylgja**
Kravið til nær ein kappingaravmarking er ein neyðug fylgja av eini regluering, er at fyritøkan kann ikki yvirhalda lóggávuna uttan at fremja kappingaravmarkingina (Konkurrenceloven m. komm., síða 88-99). Hevur fyritøkan fleiri valmøguleikar og velur tann sum er kappingaravmarkandi, so kann hon ikki brúka §2, stk. 2 sum verju.

Í hesum sambandi skal vísast á, at Fuglafjarðar kommuna kundi havt tað mannagongd, at tá umboðsfólk ella reiðarí ikki hava skipað fyri loðsflutningi og ikki hava nakað ynski hesum viðvíkjandi, so tekur kommunan avgerð um hvør skal

útinna uppgávurnar, meðan tá ið umboðsfólk ella reiðarí hava gjørt avtalu hesum viðvíkjandi ella vísa á ávísan veitara, so virðir kommunan hetta.

Loðsskyldan vildi framvegis verið røkt um omanfyrinevnda mannagongd var fylgd og vildi hon ikki ført til ta kappingaravmarking sum fer fram í dag.
Kappingareftirlitið hevur spurt Tórshavnar Havn, Klaksvíkar Havn, og Runavíkar Havn um hvussu teirra mannagongdir eru í sambandi umbønir um loðsing. Hesar havnir vóru spurdar, tí tær í støðd av virksemi eru sambærligar við Fuglafjarðar Havn.

Hesar havnir hava júst ta mannagongd sum er lýst omanfyri, nevniliga at tær hjálpa um tær verða bidnar um at hjálpa. Hevur umboðsfelag ella reiðarí longu gjørt avtalu við annan veitara um loðsflutning og sleip, so verður hesin veitari brúktur, treyta av at allar neyðugar góðkenningar fyriliggja. Hevur umboðsfelagið gjørt avtalu um sleip, men onga avtalu um loðsflutning, so tekur kommunan sær av at skipa fyri loðsflutninginum. Hava umboðsfelag ella reiðarí onga avtalu gjørt, so tekur kommunan sær av øllum.

Her skal eisini vísast á, at meðan Tórshavnar Havn og Klaksvíkar Havn hava staðbundnar veitara, so hevur Runavíkar Havn ongan staðbundnan veitara. Hóast hetta so megnar Runavíkar Havn at halda sína loðsskyldu.

Kappingareftirlitið metir at tann framferð sum Fuglafjarðar Havn fremur er ikki ein neyðug fylgja av eini regulering. Loðsskyldan kann røkjast á ein hátt, sum ikki forðar fyri at umboðsfeløg ella reiðarí sjálvi velja sín loðsflutningsveitara.

**Vísandi til §2, stk. 4 í kappingarlógini verður spurt um tann kappingaravmarking, sum Fuglafjarðar kommuna fremur er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av tí skyldu sum er áløgd kommununi, sbrt. §4, stk. 1 í loðslógini.**

Vegna Kappingareftirlitið

Sigurd Rasmussen
Fulltrúi

Kappingareftirlitið

Skálatrøð 20
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Web: www.kapping.fo

Tel: +298 35 60 40
Direct: +298 35 60 44
Mob.: +298 55 60 44